# paði viðurskifti



*– Tað eru alt ov nógvir útlendskir leikarar og venjarar í Føroyum, og hesum skulu føroyingar ansa eftir. Tí, tey sum koma úti frá, skulu ikki bara vera betri, men nógv betri enn føroyingar.*

*Savnsmyndir*

krøv vera sett til leikararnar. Og hetta kemst av, at leiðslurnar í feløgunum ikki eru nóg sterkar. Tomislav Sivic minnist tað serliga sum, at tað vóru feløgini uttanfyri høvuðsstaðin, sum ikki dugdu nóg væl og vóru ov lítið professionel, og tískil ikki stóðu seg í kappingini.

– Men sjálvandi vóru undantøk, og tað síggja vit millum annað sera væl í EB/Streymi í dag, vísir Tomislav Sivic á.

## Hevði vinnarar á liðnum

Hetta við at seta krøv, er á ongan hátt fremmant fyri Tomislav Sivic Hann kravdi nógv av sínum leikarum, men teir fingu eisini nógv aftur. Og á vøllinum sást úrslitið av miðvísa arbeiði hansara, tí tey bæði síðstu árini í B36, har liðið endaði nummar trý, spældu teir kanska besta fótbóltin í landinum.

Á hesum liðið hevði Tomislav Sivic eisini nakrar heilt serstakar menn. Óli Johannesen, John Petersen og Julian Johnson vóru millum teirra. Seinni royndu hesir seg allir uttanfyri klettarnar. Tomislav Sivic nevnir eisini fleiri aðrar, og lýsir hesar leikararnar sum vinnarar. Sum menn, ið vildu arbeiða hart fyri at røkka úrslitum.

– Tað sást eisini aftur á landsliðnum, har hesir mans spældu og eisini fingu góð úrslit, vísir Tomislav Sivic á.

## Venjaratrupulleikin var stórur

Tá Tomislav Sivic var í Føroyum, smæddist hann ikki fyri at siga sína meining. Millum annað langaði hann einaferð út eftir føroysku venjaraútbúgvingini.

– Tað er næstan so, at tú fert á skeið í trígggjar dagar, og tá tað er liðugt, so hevur tú fingið prógv, segði Tomislav Sivic við Sosialin 14. juli 1999. Hesa útsøgn stendur hann fast við í dag. Í dag er veruleikin tó ein annar, og tað er Tomislav Sivic greiður um. Hann nevnir síðani fleiri venjarar, sum hava nomið sær útbúgving síðani hann fór av landinum, og tekur millum annað Jógvan Martin Olsen, Sigfríð Clementsen og John Petersen fram sum evnaríkar venjarar.

## Vil ikki ráðgeva

Spurdur um, hvørji góð ráð hann kann geva teimum, sum vara av føroyskum fótbólti, svarar Tomislav Sivic, at tað vil hann helst sleppa undan.

– Tað verður undir øllum umstøðum ógvuliga trupult hjá mær, tá eg ikki havi verið í Føroyum síðani 2001. Men eg síggi heldur enn fegin eina framgongd í føroyskum fótbólti, sigur hann fryntliga úr horninum úr Ungarn.




**Føroyar eru næst vánaligasta landslið í Evropa. Vit hava ikki fingið nakað stig í hvørki EM- ella HM undankapping síðan 2004. Seinastu árini hava vit raplað niður eftir styrkislistanum hjá FIFA. Í løtuni liggja vit nummar 195 – bara 12 lond eru aftan fyri okkum.**

**Sosialurin varpar komandi vikurnar ljós á keðiligu gongdina. Vit leita eftir orsøkunum til, hví tað gongur so illa í hond og spyrja hvat skal til fyri at venda óhepnu gongdini?**



**Í blaðnum hósdagin verður prátað við Kurt Mørkøre um sama evni**

